TILTØK

Gudstænastur 26. mars
Glyvra kirkja: kl. 21
NÁTTARKIRKJAN.

Gudstænastur 27. mars
Elduvíkar kirkja: kl. 17
Dópsgudstænasta v/ Henning Bøgesvang

Gudstænastur 28. mars (Pálmasunnudag)
Havnar kirkja: kl. 11
Sverri Steinhólm, konfirmatión
Vesturkirkjan: kl. 11
Heri Joensen. Konfirmatiónsgudstænasta.
Argja kirkja: kl. 11
Bergur D. Joensen. Konfirmatiónsgudstænasta.
Hoyvíkar kirkja: kl. 11
Ann Hansen, konfirmatión. Eingin sunnudagsskúli vegna páskafrí. Næsti sunnudagsskúli verður 11. apríl.
Sørvágur: kl. 11 altargongd
David Johannesen
Sjóvar kirkja: kl. 11
Konfirmatión Símun P. Jacobsen
Kunoy: kl. 12
Hanus á Gørðum, altargongd.
Gøta: kl. 12 Martin R. Jacobsen (barnakór luttekur)
Norðskála: kl. 12
messa Emil Olsen
Christianskirkjan: kl. 11
Konfirmatión. Magnus Brahé Jørgensen. Talvan gongur til frama fyri Guds orðs boðan
Skopun: kl. 11 konfirmatión, Jákup R. Hansen
Sandvík: kl. 12
altargongd, Jónsvein Bech
Fuglafjørður kl. 11
konfirmatión, Uni Næs, dómpróstur
Glyvra kirkja: kl. 11
lestur og sunnudagsskúli.
Søldarfjørður: kl. 11
lestur og sunnudagsskúli.
Tjørnuvíkar kirkja:
konfirmatiónsgudstænasta kl. 11 v/ Henning Bøgesvang
Hov: kl. 11
Patrick de Neergaard, konfirmation
Viðareiði: kl. 12 Elsa Funding
Kvívík: kl. 12
Mogens Tilsted Christensen

Miðvika í Hoyvíkar kirkju
Mikukvøldið 7. apríl kl. 19 verður aftur Miðvika í Hoyvíkar kirkju, við Ovin Klein Olsen, sum er føroyingur búsitandi í Danmark. Ovin Kl. O. vaknaði ein morgun í 2006 og varnaðist, at hann hevði mist meginpartin av sjónini. Einki var at gera, og hetta var eitt so ógvusligt bakkast, at hann kom í eina sanna lívskreppu. Hvussu hann síðani vann á hesi kreppu og fótaði sær aftur, fer Ovin at greiða frá á Miðvikuni 7 apríl kl. 19. Tiltakið er í kirkjukjallaranum.

Katólska kirkjan
Fríggjadag
kl. 17.30 messa í Kerit
Leygardag
kl. 11.30 messa í Kerit
Sunnudag kl. 11 hámessa v/ Lars Messerschmidt, prestur í Mariukirkjuni.
Mánadag, týsdag og mikudag kl. 17.30 messa í Kerit.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 bíbliusøgutími fyri børn og bíbliugransking.
Kl. 11 Gudstæn. Jens V. Danielsen.

Gongutúrur
Sunnudagin kl. 10 verður gongutúrur: Rituvík, Klubbarnir, Glyvradalur Hetta er ein langur túrur og miðal tungur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við. Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

Argir, Kirkju- og missiónshúsið
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Øssur Steinhólm, Leirvík

KFUM og KFUK í Havn
Týsdagur 6. apríl kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn og juniorar.

Samkoman Marknagil
Fjalsgøta 2, Tórshavn
Sunnudagin kl. 10.30
Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20
Bønar/uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík
Sunnudagin kl. 11.30.
Barnakórið venur. Kl. 12
Møti v/ sunnudagsskúla.
Rev. Brooks úr Usa talar.
Barnaansing er undir møtinum. Verið hjartaliga vælkomin øll somul.

Fríkirkjan Oasan
Kirkjustræt
Fríggjakvøldið onki after8 vegna páskafrið
Sunnudagin ongin sunnudagsskúli vegna páskafrið, kl. 18 Missjónsmøti v/ Óla á Grømma.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin.

Lindin
Sunnudagin
kl. 11 Morgunmøti.

Evangeliihúsið, Tróndargøta
Sunnudagin kl. 11 felagsmøti við ungdómsvælsignilsi í Filadelfia.
Mánakvøldið kl. 20
lovsangs- og bønarløta.

Filadelfia Tórshavn
Leygarkvøldið kl. 21 Flare, Tummas Jacobsen talar
Sunnudagin kl. 11
Felagsmøti við Evangeliihúsið /ungdómssigning.
Kl. 18 Møti við Jan Joensen og Lene Løbner

Lívdin
Fríggjakvøldið Ungdómsmøti kl. 21 Á Brekku 3, Hoyvík
Evni: Ein vinur fyri lívið
Sunnudagur í skúlanum við Løgmannabreyt. Familjumøtið kl. 10.30, tilbiðjanarmøti kl. 11 og lovsongur og tala kl. 12. Sunnudagsskúli og Ung-Lív kl. 12. Tá tilbiðjannarmøti byrjar kl. 11 kunnu børnini fara í barnaansing og onnur kreativ tiltøk. Ung í Lívdini luttaka við vitnisburðum. Á seinna møtinum talar Jógvan Zachariassen um evnið "Tað vakra ljóta - páskavikan. Vit bjóða tær at verða hjartaliga vælkomnan á møti. Møtini sunnudag hoyrast beinleiðis við at fara inn á heimasíðuna.
Týskvøldið Bønarløta kl. 20 verður á Brekku 3, Hoyvík

Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík
Fríggjakvøldið kl. 19
Kongsins Herlið, børn 8-12 ár. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Øll vælkomin.

Ebenezer
Leygardag kl. 13
Brúðarvígsla. Anna Helena Otthamar og Helgi Olsen.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Róland í Skorini talar. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Barnaansing er meðan møti er.

Missiónshúsinum við Landavegin
Sunnukvøldið møti kl. 18
Sigurd Syderbø

Lívsins Orð
Sunnudagin kl. 10.30
v/ Martin og Oydis Olsen
Øll hjartaliga vælkomin

Saron Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti

Frelsunarherurin Vágur
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti/sunnudagsskúli, kl. 18 evang møti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta
Týsdagin kl. 09.30 orðið á borðið. Kl. 16 barnamøti.
Mikudagin kl. 16 barnamøti
Hóskvøldið kl. 18 páskastevna V/Anna Gurine og Daniel Oskarson og fleiri
Fríggjadagin kl. 11 gudstænasta. Kl. 18 møti. Kl. 21 syng við kvøld. Anna Gurine og Daniel Oskarson luttaka til hesi páskamøtir saman við fleiri. Til øll møtini verður drekka og okkurt gott til. Øll eru vælkomin.

Kedron, Vágar
Møtir og tiltøk hjá samkomuni eru at síggja á heimasíðu okkara. Øll eru hjartaliga vælkomin í KEDRON til okkara møtir og tiltøk.
www.kedron.fo.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli og einki møti vegna konfirmatión.

Kollafjarðar Missiónshús
Familjumøti v/ Karl Michelsen verður sunnudagin kl. 16 og nátturði verður aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Týskvøldið verður bønarløta kl. 20. Øll eru vælkomin.

Norðskála Kirkju- og missiónsvika
Fríggjakvøldið kl. 20
Møti. Jónhilda og Gullak syngja. Talari: Gullak Hansen.
Leygarkvøldið kl. 20
Møti. Tey ungu skipa fyri.
Pálmasunnudag kl. 12
Messa við Emil Olsen

Kvinnumøti í Nerija
Leygarkvøldið kl. 20 har m.a. Lydia Petersen fer at tosa um evnið, "Klæðið tykkum í kærleika." Systrarnar úr Nebo á Toftum fara at syngja. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Kambsdalur, Handilsskúlin
Sunnudagin kl. 11
Breyðbróting.
Týskvøldið kl. 20
Bønar- og uppbyggingarmøti.

Tabor, Toftir
Leygarkvøldið verður ungdómsmøta kl. 21. Okkara egni Ólavur Ø. Hansen, kemur at greiða frá spennandi túri í Rumenia.
Hjartaliga vælkomin

Keldan, Skálafirði
Sunnudagin kl. 17, Møti við Leif Høj. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.

Bygdalegan fyri Skála og Skálafirði
verður í Leguhúsinum í Nesvík. Vikuskifti 9-11 apríl. Aðrar familiur sum hava tilknýti til bygdirnar eru vælkomin at vera við.
Tekning fer fram hjá Jóhannu á tlf 270293.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Fríggjakvøldið kl. 21
Náttarkirkja: Andakt
v/ Christian Joensen, Bønargonga og sangframførðsla
Sunnudagur kl. 17 Møti
v/ Egon Kattner eftirskúlalærari og prestur frá nordsjælland efterskole.
Sunnudagsskúli í kjallarinum.
Um tær manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091

Karmel, Eiði
Sunnukvøldið kl. 19
Møti við Sigurd Sørensen

KFUM & K í Klaksvík
Sunnudagin
Kl. 14 Sunnudagsskúli
Kl. 17.30 Bønarløta
Kl. 18 Møti við Niels Andreassen.
Kl. 21 Ungdómsmøti

Soli Deo Gloria
Sunnudagin vegna konfirmatión, verður onki møti.

Getsemane, Stangaskákið 1
Sunnukvøldið kl. 18 er møti. Barnamøti er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 06.15 er morgunbøn.

Kalsoy
Møti í Bygdahúsinum á Húsum og í Mikladals kirkja
Møti verður sunnudagin í Bygdahúsinum á Húsum kl. 16 og í Mikladals kirkju kl. 19 við Jóhan Hendriksen og øðrum úr Emmaus í Klaksvík.
Øll vælkomin

Missiónshúsið Tvøroyri
Sunnudagin kl.14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Jóannes Mortensen. Øll eru vælkomin.

Bethel, Vágur
Sunnudagin
Kl. 11 Breyðbróting
Kl. 12.30 Sunnudagsskúli
Kl. 18 Familjumøti. Aftaná verður nátturði.
Øll eru hjartaliga vælkomin

Tilhaldið í Tórsgøtu
tlf: 316491/286491
tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til hósdag kl. 09-17 og fríggjadag kl. 09-16. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 10 Fimleikur, Grete Ellingsgaard.
Kl. 11 Enskt talumál.
Kl. 11 Máling og tekning, Arngerð Joensen.
Kl. 14 Kortspæl og onnur spøl.
Týsdagin
Kl. 10 Vit syngja, Óli Vang.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 14 Prát. Øll eru vælkomin.
Mikudagin
Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen.
Kl. 9 Veving, Joana Bjarnastein.
Kl. 9 Bindiklubburin.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhug.
Kl. 9 Bindiklubbur á veghæddini.
Kl. 14-17 Prát. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 15 Fimleikur, Dánjal Húsgarð.
Tilhaldið er stongt frá 1. apríl til og við 5. apríl. Tilhaldið ynskir øllum einar gleðiligar páskir.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.

Glyvra Blákrossfelag
Leygarkvøldið kl. 19.30 verður aðalfundur og hugnaløta í Missión- og Ungdómshúsinum. Tórfríður Magnussen innleiðir og Jan Joensen sigur frá lívi sínum. Eisini verður burturluting. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Pensionistafelagið í Havn
Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Telefon: 22 27 33